




# Fýra personar og fýra stovur – hvør býr hvar

Fýra kendir føroyingar úr ymiskum tættum í samfelagnum – ein umboðsmaður, ein politikari, ein vinnulívsmaður og ein stovnsleiðari vísa okkum stovur sínar. Parað rættan bókstav saman við røttum talið og git hvør býr hvar. Svarið finnur tú á næstu síðu.

Tekst: Rigmor Dam
Myndir: Jens Kristian Vang og Álvur Haraldsen

A Jákup Olsen, vinnulívsmaður, Vágur

B Sólja í Ólavsstovu, Løgtingsins Umboðsmaður, Kaldbak

C Ingi Mohr, stovnsleiðari, Tórshavn

D Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin, Hoyvík.

Framhald á næstu síðu ▶

# Her búgva tey fýra

## B + 4



**SÓLJA Í ÓLAVSSTOVU, LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR, KALDBAK**

Eftir at hava verið búsitandi í Grønlandi í nógv ár er Sólja flutt heim til Føroyar aftur. Her býr hon í elligomlu umvældu húsunum, sum vóru karmur um barnaárini hjá mammuni.

– Mær dámar best tann klassiska stílin og endiliga ikki ov nógv nipsting. Innan listaøkið dámar mær bæði tað abstrakta og naturalistiska.

## A + 3



**JÁKUP OLSEN, VINNULÍVSMAÐUR, VÁGUR**

Jákup Olsen býr í 40 ára gomlu sethúsunum í Vági. Hóast húsini eru ríkiliga stór, nú børnini eru flutt heimanífrá, royna tey at nýta øll húsini enn, so lív er í. Myndin er tikin niðaneftir, so vit síggja ikki frálíka útsýnið, sum hevur so stóran týdning fyri Jákup.

## D + 1



**ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK, LØGTINGSKVINNA FYRI TJÓÐVELDISFLOKKIN, HOYVÍK.**

Annita hevur búð í húsunum í sjey ár og hon leggur stóran dent á, at tað skal vera ljóst og luftigt í heiminum.

– Samstundis sum stovan skal vera pen, so skal hon avgjørt eisini vera barnavinarlig. Henni dámar best abstraktar oljumálningar eftir føroyskar listamálarar.

## C + 2



**INGI MOHR, STOVNSLEIÐARI, TÓRSHAVN**

Stílurin er gamalt og nýtt blandað saman, men við einum heldur konservativum dámi, sum hann tekur til.

– Tað hevur nógv at týða, at tingini hava eina søgu, og at vit kenna andan frá teimum ið fóru. Heimið skal ikki vera ov ljóst, tí vit kunnu sjálvi skapa ljós.